

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 02 - 2012

# Husky Energy fyrireikar boring í Grønlandi

Kanadiska oljufelagið Husky Energy fyrireikar seg til at bora eftir olju í Grønlandi næsta ár. Umboð fyri felagið vóru nú um dagarnar í Sisimiut. Har hevur kommunan gjørt av at byggja havnina út, og kanadiska felagið ælar sær at brúka Sisimiut sum høvuðsstøð í sambandi við leitiboringina. Skuldi tað hent, at havnin í Sisimiut ikki er liðug næsta ár, ætlar Husky Energy at hava Aasiaat sum støð á landi. Í Sisimiut bíða tey við spenningi eftir at hýsa virkseminum hjá Husky Energy. Felagið hevur sagt býráðnum, at tað fer at brúka millum 1.000 og 1.200 fólk í sambandi við leitingina í hvørjum leitiskeiði, sum eftir ætlanini verður frá juni til september. Harafturat skal felagið brúka pláss á havnarlagnum til ta tungu útgerðina, sum krevur nógv pláss.